**Ingilín D. Strøm**
**Hervør Pálsdóttir**
**løgtingsmenn**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 62/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya** (Løgtings- og landsstýrismenn v.m., broytt starvsheiti)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya**
(Løgtings- og landsstýrismenn v.m., broytt starvsheiti)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Aftaná § 1, men áðrenn yvirskriftina yvir § 2, verður sett:

“**§ 1 a.** Tá tað í hesari løgtingslóg stendur:
1) løgtingsfólk, kann almenna starvsheitið eisini vera løgtingsmaður ella løgtingskvinna.
2) løgtingsformaður, kann almenna starvsheitið vera løgtingsformaður ella løgtingsforkvinna.
3) landsstýrisfólk, kann almenna starvsheitið eisini vera landsstýrismaður ella landsstýriskvinna.
4) løgmaður, kann almenna starvsheitið vera løgmaður ella løgkvinna.
5) næstformaður, kann almenna starvsheitið vera næstformaður ella næstforkvinna.”

**2.** Í § 2, § 9, stk. 3, § 13, § 18, stk. 1, § 19, § 21, stk. 2, § 28, stk. 3 og § 30 verður “tingmonnum” broytt til: “tingfólkum”.

**3.** Í § 5, stk. 2 verður “løgtingsmannatalið” broytt til: “talið av tingfólkum”.

**4.** § 6, stk. 1 verður orðað soleiðis: “Løgtingsfólk verða vald fyri fýra ár í senn.”

**5.** Í § 6, stk. 4 verður “Løgtingsmaður” broytt til: “Løgtingsfólk”.

**6.** Í § 7 verður “val tingmanna” broytt til: “valið av tingfólkum”.

**7.** Í § 7 og § 22 verður “tingmaður” broytt til: “tingfólk”.

**8.** Í § 8 verður “løgtingsmaður er valdur, skal hann” broytt til: “løgtingsfólk er valt, skal tað” og “skipað hann í” verður broytt til: “skipað tað í”.

**9.** Í § 10, stk. 2 verður “løgtingsmenn, løgmaður, landsstýrismenn og

embætismenn” broytt til: “løgtingsfólk, løgmaður, landsstýrisfólk og embætisfólk” og “hvørjir embætismenn” verður broytt til: “hvørji embætisfólk”.

**10.** Í § 14 og § 37 verður “landsstýrismenn” broytt til: “landsstýrisfólk”.

**11.** Í § 15, stk. 1 verður “landsstýrismonnum og løgtingsmonnum” broytt til: “landsstýrisfólkum og løgtingsfólkum”.

**12.** Í § 19 og § 38, stk. 4 verður “embætismonnum” broytt til: “embætisfólkum”.

**13.** Í § 21, stk. 1 verður “løgtingsmanni” broytt til: “løgtingsfólki” og “landsstýrismanni” verður broytt til: “landsstýrisfólki”.

**14.** Í § 21, stk. 2 verður “løgtingsmaður” broytt til: “løgtingsfólk”.

**15.** Í § 23 verður “Løgtingsmenn eru bert bundnir” broytt til: “Løgtingsfólk eru bert bundin”.

**16.** § 24 verður orðað soleiðis:

“**§ 24.** Eingi løgtingsfólk kunnu uttan samtykki løgtingsins verða ákærd ella fongslað á nakran hátt, uttan so, at tey verða tikin á búri.
*Stk. 2.* Eingi løgtingsfólk kunnu uttan samtykki tingsins verða kravd til svars uttantings fyri tað, tey hava sagt innantings.”

**17.** Í § 25 verður “Samsýning løgtingsmanna” broytt til: “Samsýning til løgtingsfólk”.

**18.** Í § 27, stk. 1 verður “tveir landsstýrismenn” broytt til: “tvey landsstýrisfólk”.

**19.** Í § 27, stk. 2 verður 2. pkt. orðað soleiðis: “Løgmaður ásetur, hvussu nógv landsstýrisfólkini skulu vera, og tilnevnir tey.”

**20.** Í § 28, stk. 1 verður “formonnunum” broytt til: “formonnunum ella forkvinnunum”.

**21.** § 29 verður orðað soleiðis:

“**§ 29.** Loyst skulu verða úr embæti løgmaður ella landsstýrisfólk, ið biðja um tað. Løgtingsformaðurin loysir løgmann úr embæti, og løgmaður loysir landsstýrisfólk úr embæti.
*Stk. 2.* Løgmaður kann eisini í øðrum førum loysa úr embæti landsstýrisfólk og skal loysa landsstýrisfólk úr embæti, um tað við atkvøðugreiðslu í løgtinginum, har ið meira enn helmingur av øllum løgtingsfólkum atkvøður fyri, verður samtykt, at løgtingið ikki longur hevur álit á landsstýrisfólki.”

**22.** §§ 32 og 33 verða orðaðar soleiðis:

“**§ 32.** Løgtingsfólk, sum verður løgmaður ella landsstýrisfólk, sigur frá sær løgtingssessin, meðan tað situr í landsstýrinum.
*Stk. 2.* Nærri reglur um setingarviðurskifti hjá løgmanni og landsstýrisfólkum verða ásettar í løgtingslóg.

**§ 33.** Løgmaður býtir málsøki landsstýrisins millum landsstýrisfólkini. Tey sita fyri málsøkjum sínum hvør sær.
*Stk. 2.* Løgmaður samskipar størvini hjá landsstýrisfólkum og boðar í hesum sambandi regluliga til landsstýrisfunda, har m.a. øll uppskot landsstýrisins til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og eykajáttanir verða framløgd, áðrenn tey verða løgd fyri løgtingið.

*Stk. 3.* Løgmaður hevur eftirlit við, at hvørt einstakt landsstýrisfólk situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt."

**23.** § 36 verður orðað soleiðis:

"**§ 36.** Løgmaður ger av, hvørt av landsstýrisfólkunum er varaløgmaður og røkir heimildir løgmans, meðan hann hevur forfall. Er einki ásett, verða hesar heimildir røktar av tí landsstýrisfólki, sum longst hevur sitið í embæti. Hava tvey landsstýrisfólk sitið líka leingi, tekur tað eldra við heimildunum."

**24.** Í § 38, stk. 1 verður "løgtingsmonnum" broytt til: "løgtingsfólkum".

**25.** Í § 38, stk. 2 verður "løgtingsmonnunum" broytt til: "løgtingsfólkunum".

**26.** Í § 39 verður "uttantingsmann" broytt til: "uttantingsfólk".

**27.** Í § 54 verður "løgtingsmenn" broytt til: "løgtingsfólk".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur ikki í gildi, fyrr enn tað verður ásett við serstakari løgtingslóg.

**Almennar viðmerkingar**

Kvinnur fingu í 1915 valrætt til løgting og fólkating. Samstundis fingu kvinnur rætt til at stilla upp, og sostatt at verða løgtingsmaður, landsstýrismaður ella løgmaður. Fyrstu kvinnurnar vórðu valdar á ting í 1978. Fyrsti kvinnuligi landsstýrismaður varð settur í 1985. Síðan tá hava 16 kvinnur røkt embæti sum landsstýrismenn. Í 1993-94 er fyrstu og einastu ferð, at ein kvinna hevur verið løgmaður.

Síðan fyrstu kvinnurnar vórðu valdar inn á ting, hava 28 kvinnur verið løgtingsmenn. Hesar verða í dagligari talu, í almennu miðlunum umframt í Løgtinginum, róptar *løgtingskvinnur*. Tó er hetta enn ikki galdandi formliga í Stýrisskipanarlógini.

Løgtingið og landsstýrið hava við Javnstøðunevndini og Demokratia sett sær fyri at fremja arbeiðið við javnari umboðan millum kynini. Hetta arbeiðið er framvegis neyðugt, tí løgtingsvalið í 2019 førdi til, at bert 8 av 33 løgtingsmonnum eru kvinnur. Um tey, ið verða vald inn á ting, framvegis skulu verða rópt løgtingsmenn, landsstýrismenn, løgtingsformenn, nevndarformenn og løgmenn, kann mann seta spurnartekin við, hvørt stýrisskipanin leggur upp til, at hesi skulu vera annað enn mannfólk. Tí er tíðin komin til at broyta hesar orðingarnar, so tær fevna um bæði kynini.

Javnstøðunevndin og Málráðið hava áður mælt til at broyta orðingarnar, so tær fevna um bæði kynini. T.d. í tingmáli nr. 11/2010, "Uppskot til løgtingslóg um stjórnarskipan Føroya" og í tingmáli nr. 19/2017, "Uppskot til løgtingslóg um Stjórnarskipan Føroya".

Starvsheitini landsstýrismaður, løgtingsmaður og tingmaður verða broytt í allari lógini, men starvsheitini løgmaður og løgtingsformaður verða standandi. Við ásetingini í § 1 a verða almennu starvsheitini fyri hesi embæti tó tillagað eftir, hvør situr í embætinum. Um hesar orðingar skuldu verið tillagaðar í allari lógini at fevnt um bæði kynini uttan at funnið heilt

nýggj heiti, hevði talan gjørst um ov tungan og fløktan lógartekst, og tí er loysnin við § 1 a vald ístaðin.

Eisini verður heitið embætismaður broytt til embætisfólk og uttantingsmaður broytt til uttantingsfólk.

Uppskotið hevur ikki við sær nakrar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar annað enn, at umrøddu heitini verða broytt.

**Serligar viðmerkingar**

Til § 1.
Við hesum broytingum verður gjørt upp við almennu kallkynsheitini í Stýrisskipanarlógini, soleiðis at farið verður frá orðinum maður í øllum viðurskiftum, til at tosa um kvinnu og mann ella um fólk. Við broytingini fer lógin at tosa um løgtingsfólk, tingfólk og landsstýrisfólk sum felagsheiti, tó soleiðis, at hesi eisini kunnu velja at nevna seg sjálvi løgtingsmaður ella løgtingskvinna, tingmaður ella tingkvinna og landsstýrismaður ella landsstýriskvinna. Tó verða heitini løgmaður, løgtingsformaður og næstformaður standandi í lógartekstinum, men almennu starvsheitini verða við § 1 a broytt alt eftir, hvør situr í embætinum. Hendan loysnin er vald, so lógarteksturin ikki gerst ov tungur og fløkjasligur. Eisini verður heitið embætismaður broytt til embætisfólk og uttantingsmaður broytt til uttantingsfólk. Ongar aðrar innihaldsligar broytingar eru, men einans málsligar tillagingar, har kynini krevja, at orðingar verða broyttar.

Til § 2.
Sambært § 57, stk. 1 í Stýrisskipanarlógini kunnu broytingar í lógini ikki gerast, fyrr enn samtykta lógaruppskotið eftir næsta val verður samtykt óbroytt í fyrstu setu nývalda tingsins. Hetta lógaruppskotið kann tí ikki koma í gildi, fyrr enn eitt nýtt løgting eftir næsta val eisini samtykkir uppskotið.

**Á Løgtingi, 6. februar 2020**

Ingilín D. Strøm Hervør Pálsdóttir